**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

**Eldraráðið 2021 – 2024**

**Fundur nr. 04 2024**
**Dagfesting:11-04-24 klokkan 13:00 – 14:30**
**Stað: Tilhaldið í Tórsgøtu**

Møtt: Katrin Holm, forkvinna, Robert Vilhelmsen, næstformaður, Petur Rouch, skrivari, og Marin Rasmussen, limur.

Á skránni.

1:Fundur við Eldranevndina hjá Tórshavnar kommunu 9. apríl 2024

2:Eldradagurin 2024

3:Ymist

**Ad. 1 Fundur við Eldranevndina hjá Tórshavnar kommunu 9. apríl 2024**

Eldraráðið var eftir umbøn boðið til fundar við limir í Eldranevndini hjá Tórshavnar Kommmunu, og er hetta fyrstu ferð, at Eldraráðið hevur havt fund við Eldranevndina. Høvuðsevnið á fundinum var bústaðarviðskifti hjá eldra borgaranum í TK. Serliga er hugsað um hjún ella einstaklingar, sum búgva í egnum húsum, hóast hesi kundu ynskt okkurt minni at búleikast í.
Eldranevndin ásannaði, at tey ikki høvdu gjørt stórvegis tiltøk burturav til henda bólk av Havnarfólki. Men tey tóku væl ímóti hugskotinum hjá Eldraráðnum um at taka upp evnið til Eldradagin 2024. Og tey vildu fegin luttaka aktivt á degnum.

Tosað var um ein almennan forfund, sum TK skipaði fyri - til dømis í Finsen – men ongin dagur var funnin. Ætlanin er, at Eldradagurin verðu í september 2024, tí nýtt eldraráð verður valt í oktober, so skotbráðið er kanska ov stutt millum Aulufundin og Eldradagin.

Í hesum sambandi kann eg ikki lata vera við at sitera burturúr samgonguskjalinum milllum javnaðarflokkin og sambandsflokkin frá 2019 undir ”Vælferð og trivnaður”:

”Okkum tørvar ungdóms- , lestrar,  og eldrabústaðir í kommununi, og vit fara beinanvegin undir at byggja leigu- og lutaíbúðir saman við Bústøðum.”

Longu í 1991 er talan um at byggja Eldraíbúðir – ta ferðina á Skálatrøð -og síðani hevur hetta verið upp at venda ferð eftir ferð. Men onki er hent, og eldru fólk við tørvi at skifta bústað føla seg slept uppá fjall.

**Ad. 2 Eldradagurin 2024.**

Sum sagt fyrr er okkara ætlan fyri seinasta eldradagin hjá sitandi Eldraráð, at kasta ljós á eina munagóða bygging av eldraíbúðum í TK. Eldrabýlingar eru vanligir í okkara grannalondum, tað verið seg Danmark, Norra, Svøríki, Finnland og Ísland. Har tey eldru

kunnu fáa eitt trygt uppihald  í einum tryggum umhvørvi, meðan tey enn eru før fyri at klára seg sjálvan. Men við felags fasilitetum sum felagshús til serlig tiltøk og tøkar íbúðir, ein kann leiga, tá familja kemur á vitjan. Aðrir fasilitetir kunnu vera felags vaskirum og hjalspláss. Og húsavørður verður knýttir at býlinginum.

Vit leita tí eftir fólki til at luttaka Eldradagin. Fólk, sum kunnu varpa ljós á eina slíka bygging.

Hesi vóru nevnd á fundinum:

Umboð fyri eldrapolitikkin hjá Tórshavnar kommunu.
Umboð fyri Bústaðir.
Hans Jakku Hermansen, sum arbeiðir við lutaíbúðarloysnum.
Beata Samuelsen fyri Landsfelag Pensjónista.
Fólk, sum hava kunnleika til líknandi bygging uttanlands, møguliga fólk úr Danmark – og møguliga við beinleiðis ella online fyrilestri.

Eisini er ætlanin at gera eina tørvskanning, men enn er ikki avgjørt um hetta verður Gallup ella Spyr.fo.

Eldradagurin kann vera ein fríggjadag í september og Katrin vil seta seg í samband við Dansifrøi har vit ætla, at tiltakið skal vera.

**Ad. 3 Ymist**

Fundarfrágreiðing 03-2024 var góðkend.

Robert arbeiðir við uppskoti til skrá fyri Eldradagin til næsta fund. Tað verður so sent víðari til Býráðið.

Næsti fundur verður hósdagin 2. mei 2024 klokkan 13 í Tilhaldinum.

Skrivað Petur Rouch 13. apríl 2024

*PS:Eftir fundin kundi Katrin upplýsa at Eldradagurin 2024 verður hildin í Dansifrøi fríggjadagin 6. september 2024.*